*»Kursk«:*

# Sannleikin um vanlukkuna liggur umborð

*Norskir serfrøðingar halda, at tann sokni russiski kavbáturin hevði elektroniska útgerð, sum kanska kann greiða frá tí, sum veruliga hendi, tá kávbáturin sakk í Barentshavinum*



Talan er ikki um ein svartan kassa sum umborð á flogførum, men sambært norsku serfrøðingunum plaga kavbátar at hava serliga ávaringarskipan umborð, tá teir taka lut í venjingum, og »Kursk« var júst við í einari slíkari venjing, tá vanlukkan hendi.

Norski kavbátaserfrøðingurin, Harald Håkonsen, sigur, at undir slíkum royndum hava kavbátar m. a. tól, sum skráseta alt, sum hendir í tí elektroniska útbúnaðinum umborð, eins og alt, sum hendir í teimum ymsu skipanunum, verður skrásett í einari teldu umborð á kavbátinum. Vanliga situr hendan skrásetingarútgerðin beint undir torninum á kavbátinum.

Tað er ikki heilt greitt, hvørja útgerð »Kursk« hevði, men norðmenn ivast ikki í, at tann risastóri russiski kavbáturin hevði alla nútímans elektroniska útgerð umborð.

Var talan um ein vesturlendskan kavbát, hevði skrásetingarútgerðin kunnað greitt frá, hvussu skjótt kavbáturin sigldi, hvussu djúpt hann sigldi, og um nakað hendi við útgerðini, sum stýrir vápnunum umborð. Júst hetta seinasta kundi havt týdning í førinum við »Kursk«, tí hildið verður, at tað var ein spreinging, sum elvdi til, at hann sakk.

**Kann siga sannleikan**

Harafturímóti skrásetir útgerðin umborð á kavbátum ikki tað, sum sagt verður, men norsku serfrøðingarnir siga, at hóast tað kann tað hava avgerandi týdning at fáa fatur áteirri skrásetingarútgerðini, sum uttan iva er umborð á »Kursk«.

– Er útgerðin heil enn, er einki at ivast í, at hon kann siga okkum eitt og annað, sigur Jarl Johnsen á rannsóknarstovuni hjá norska herflotanum. Hann heldur, at tað átti at havt áhuga millum russiskar herflotamenn at fingið fatur á útgerðini, tá hon kanska kann avdúka sannleikan um vanlukkuna við »Kursk«.

Blaðið Jane's Defense Weekly heldur eisini, at »Kursk« hevði slíka skrásetingarútgerð. Sambært blaðnum hevði kavbáturin eisini serliga sonar-útgerð, sum skrásetti allar rørslur rundan um kavbátin, og møguligar rørslur eru alt fyri eitt skrásettar í útgerðini beint undir torninum.



*Hjá Skógrøkt Landsins eru tey heldur enn ikki vónbrotin av, at vespurnar vera jagstaðar, sum tær hava verið tað seinastu vikuna. – Fyri okkum er vespan nyttudýr burturav, tí umframt at dusta planturnar, so etur hon eisini lús og annað, sum annars ger skaða á planturnar, sigur Heini Joensen, frá Skógrøkt Landsins*

*Vespuøsing í Havn*

# – Eingin vandi er á ferð

*Tað sigur Heini Joensen, frá Skógrøkt Landsins, sum heldur, at føroyingar missa vit og skil, tá vespan verður tikin upp á tungu. — Fyri okkum á Skógrøktini er hon eitt nyttudýr burturav, tí hon dustar planturnar, og etur annars lýs og onnur skaðadjór, sigur hann*

SVEINUR TRÓNDARSON

– Føroyingar eiga at taka tað meira róligt og ikki renna frá viti og skili, tá tey síggja eina vespu. Hon er ikki tað skaðadjór, sum fleiri vilja gera hana til. Hon er tvørturímóti eitt nyttudjór burturav og hjá Skógrøktini eru vit meiri enn fegin um, at vespan leggur leiðina hendavegin.

So greiður er Heini Joensen, frá Skógrøkt Landsins, tá hann talar um vespurnar.

Hann heldur tað nevniliga vera meiri enn ótrúliga keðiligt, at vespurnar meiri ella minni eru jagstraðar av landinum, hesar seinastu vikurnar.

**Tær eru óførar**

Í seinastu viku hoyrdu vit í Útvarpinum um eitt vespubýli í einum garði í Havn. Hetta býli var burturbeint, av tí at eigararnir ikki vóru tryggir við at hava hesar fremmandu gestirnar í havanum.

Fyrst í hesi vikuni hoyrdu vit so um tvey onnur vespubýli, sum skuldu burturbeinast, og enn einaferð var orsøkin, at eigararnir ikki vóru tryggir við fremmandu gestirnar.

Tì tað er einki yvir at dylja, at talan er um fremmandar gestir. Vespur og býflugur eru ikki vanligar her um vegir, men tað hendir seg viðhvørt, at tær koma til landið.

– Vit skuldu heldur verið fegin um, at vespurnar eru her. Tær gagna væl hjá okkum sum hava við urtagarðar at gera. Í veruleikanum er tað so, at vespurnar mangla hjá okkum, tí tær dusta planturnar. Tá tær ikki eru her, so verða vit noydd til at gera tað við pensli, greiðir Heini frá.

– So tað sigur seg sjálvt, at vit eru fegin um at hava fingið ein so raskan hjálpara til landið. Tá ein so eisini hugsar um, at vespurnar eta ókrútið av plantunum, so er tað enn meira keðiligt, at tað verður so stór øsing um eitt flogkykt, sum er størri nyttudýr enn skaðadýr, leggur hann afturat.

**Ræðast tað ókenda**

Ein trupulleiki, sum nógvir garðeigarar hava at dragast við er, at planturnar í garðinum ofta eru álopnar av lús og øðrum »ókrúti«. Fyribrigdið er als ikki ókent í Føroyum, men sambært Heina so kemur hetta ikki fyri í gørðum, har vespubýlir eru. Vespurnar eta nevniliga lýsnar og tí eru bløðini í »vespugørðum« nógv penari á at líta, enn aðrastaðni.

– Vespurnar liva jú av lús og líknandi. Tì er tað ein funnin fressur, at tær gera sær eitt býli í einum slíkum garði, tí tá flúgva tær runt og reinsa planturnar fyri ókrút, samstundis, sum tær dusta planturnar, sum standa í garðinum, sigur Heini Joensen.

Tí heldur hann at talan er um, at fólk ikki vita, hvat tað er tey hava við at gera, tá tey síggja eitt vespubýli, og so fer vitið út.

– Tað er kanska líka nógv, at fólk ræðast tað ókenda. Ein vespa er púra vandaleys fær hon frið. Tað er ikki fyrr enn hon verður jagstrað, at hon stingur. So einfalt er tað. Eg haldi, at vit eiga at lata vespurnar vera í frið, og lata náttúruna ráða sær sjálvari fyri einaferð skyld, sigur Heini Joensen.

Annars leggur Heini afturat, at trupulleikin við lús á plantum júst kemst av, at planturnar eru fremmandar í okkara landi. – Vit flyta inn plantur uttan at hava tað við, sum skal syrgja fyri, at planturnar kunnu liva væl. Og tá vespurnar so koma til landi, so rópa vit.

**Flatmaðkurin somu viðferð**

Heini Joensen heldur lítið um okkara máta at reagera uppá, tá vit síggja eitthvørt ókent. Fyri nøkrum árum síðani var tað flatmaðkurin, sum fekk toyggi, tá onkur hevði funnið ein slíkan á tinghúsinum. Flatmaðkurin skuldi vera skaðadjór og tí kundi tað vera sera vandamikið, um hann fótaði sær í Føroyum.

– Tað er sama søga enn einaferð. Flatmaðkurin kemur úr Ný Sælandi, har hann livir saman við reyðmaðkinum í eini javnvág, sum náttúran sjálv hevur skapt. Her fór alt upp at garta tá tey hoyrdu orðið flatmaðk, ístaðin fyri at taka tað róligt. Tað sama var við havørnini, sum hevði lagt leiðina hendavegin. Hon var skotin, tí hon skuldi eta lomb, men so vítt fólk veit, so hevur hon ongantíð etið lomb. Aftur her leypa fólk á leistum tí okkurt ókent kemur inn í okkara samfelag, sum annars eitur at vera so tolið, sigur Heini, sum ikki dylir fyri, at hann er sera keddur av tí øsing, sum hevur verið.

- Tað er troyttandi at hoyra, serliga tá hugsað verður um fyrimunirnar av at hava vespuna her, leggur hann afturat.

Sum sagt, er tað eingin, sum veit, hvussu vespan er komin til landið, men boðini eru fleiri. Onkur heldur, at hon er komin við frukt til handlarnar og onkur annar heldur, at hon er komin við flagnum, sum kom til Tórsvøll. Vit mugu fyribils bara staðfesta, at vespan er í landinum, og at tey, sum hava við urtagarðar at gera eru fegin um, at hon er her. Hvussu hon yvirlivir veturin er ikki gott at vita, men í veruleikanum er tað bara drotningin, sum yvirlivir. Hvussu hon lívbjargar sær í hesum regninum og vindinum, sum nú er uttanfyri, mugu onnur svara upp á.



# Strandfaraskip høvdu hall

*Ein lítil millión í halli. Soleiðis sá botnlinjan hjá Strandfaraskipum Landins út, tá farna roknskaparár var komið at enda. Hóast Vinnumálastýrið álegði fyritøkuni ikki at fara út um játtanina, eru Strandfaraskip Landsins væl nøgd við úrslitið*

RÚNAR REISTRUP

Orsakað av at útreiðslurnar gjørdust størri enn mett varð, kláraði Strandferðslan ikki at halda seg innan fyri játtanina fyri 1999. Ístaðin bleiv úrslitið eitt minni hall á 775.000 krónur.

Hetta stendur at lesa í ársroknskapinum hjá Strandfaraskipum Landsins fyri árið 1999.

Fyritøkan gjørdist í november í fjør varug við, at eitt hall var í væntu, og boðaði beinanvegin Vinnumálastýrinum frá hesum. Seinni heitti almenna fyritøkan so á umsitingina um at kanna hvussu útlitini vóru fyri eini eykajáttan, ið kundi fáa rakstrarætlanina at javnviga.

Svarið var at eykajáttan ikki fór at verða givin. Vinnumálastýrið heitti í desember á Strandfaraskip Landsins um at fremja sparingar, soleiðis at fyritøkan helt seg innan fyri játtanina, men fyritøkan sá seg ikki føra fyri at fremja munandi sparingar, uttan at tað gekk hart útyvir tænastustøðið.

Tí endaði árið hjá Strandfaraskipum Landsins við 775.000 kr. minus á botnlinjuni. Hetta metir fyritøkan sjálv vera eitt nøktandi úrslit, sæð í mun til umstøðurnar. Her verður serliga sipað til gamla skipaflotan hjá fyritøkuni, ið tíðum krevur størri ábøtur enn væntað.

# Umvælingar spreingja fíggjarætlanina

*Tað kostaði nógv minni at reka skipaleiðirnar hjá Strandfaraskipum Landsins í 1999 í mun til 1998. Høvuðsorsøkin til hetta er at skipaumvælingarnar vóru væl smærri og færri í fjør enn árið fyri*



*Støddin á umvælingunum av skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins avgera í stóran mun, um ársúrslitið hjá fyritøkuni er gott ella ringt*

RÚNAR REISTRUP

Skipaflotin hjá Strandfaraskipum Landsins er so gamal, at umvælingarútreiðslur vegna slit lætt kunnu koyra fíggjarætlanina um koll.

Hetta hendi til dømis í 1998, tá fleiri ógvusliga umvælingar av teimum størru skipunum í flotanum høvdu við sær, at samlaði kostnaðurin at reka siglingina millum oyggjarnar gjørdist góðar fýra milliónir hægri enn væntað.

Í ársroknskapinum hjá Strandfaraskipum Landsins sæst, at kostnaðurin at reka oyggjasiglingina var hálva sjeyndu millión lægri í fjør í mun til árið fyri.

Hetta kemst partvís av at Skálafjarðarleiðin, sum er tann leiðin, ið gevur lutfalsliga størsta undirskot í mun til inntøkurnar, lá still ein góðan part av 1999 og soleiðis spardi Strandfaraskipum Landsins smáar 2 milliónir.

**Umvælingarnar gjørdu munin**

Men høvuðsorsøkin til at tað gjørdist so nógv bíligari at reka strandfarasiglingina í 1999 í mun til 1998 var, at hepnið var við Strandfaraskipum Landsins við tað at umvælingarnar av strandfaraskipunum ikki vóru so umfatandi hetta árið.

Samanlagt kostaði tað Strandfaraskipum Landins 19 milliónir at reka siglingina millum oyggjarnar í 1999. Í 1998 var hesin kostnaður góðar 25 milliónir krónur.

Stjórin á Strandfaraskipum Landsins, Reidar Nónfjall, sigur seg vóna, at hepnið eisini fer at vera við fyritøkuni árini framyvir, so tað slepst undan stórum óvæntaðum umvælingum.

– Vit mugu bara vóna, at kostnaðurin fyri 1999 verður umboðandi fyri framtíðarkostnaðin, og at vit ikki uppliva fleiri ár sum 1998, tá nógv gekk fyri innan stutta tíð, sigur Reidar Nónfjall.

**Nýggj skip hjálpa**

Við nýggjari Sandoyarferju, sum nú verður bygd, og við nýggjari Suðuroyarferju, ið nú skal projekterast, er eisini væntandi, at útreiðslurnar til viðlíkahald fara at minka.

Sum er ber so at siga ikki fyritøkuni til at leggja eina fíggjarætlan fyri raksturin av sjófarleiðunum og hava vissu fyri, at hon heldur. Tað vísti árið 1998 týðuliga, tá fíggjarætlanin var 4 milliónir lægri enn veruligu útreiðslurnar gjørdust tá árið var at enda komið, orsakað av óvæntaðum umvælingum og nýggjum trygdarkrøvum.

Hóast útreiðslurnar til oyggjaleiðir vóru nakað lægri í 1999 enn fíggjarætlanin legði upp til, so fóru samlaðu útreiðslurnar hjá Strandfaraskipum Landsins nakað út um játtanina. Hetta komst serliga av, at fyrisitingarligu útreiðslurnar hækkaðu orsakað av lønarhækkan í sáttmálunum við starvsfólkini.


